# Kafeteriahjálp til Perluna í SMS

**Perlan í SMS søkir eftir fólki til ymiskt fyrifallandi arbeiði - at byrja beinanvegin.**

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt starv til tín á einum livligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir og ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Tóru.

MATSTOVAN FYRI ALLA FAMILJUNA
Perlan

Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TEL 315061

---

# Brandt Blomberg

Hvítvørur til føroyska húsarhaldið



**Turkitrumla**

5 kg av klæðum

Tíðarstýrd til lágan og høgan tempereatur

prísur fyrr 5.395,-

**Nú 4.795,-**

pf Klement Petersen

Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

---

Frá Vágs skúla

# Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 27 tímar um vikuna.

Starvið er tíðaravmarkað frá 3. apríl til 30. juni 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran tlf. 373192.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi seinast fríggjadagin 15. mars 2002.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Agnes Tausen
900 Vágur

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Starvsfólk til heimavitjanartænastuna

Fyri at betra um trivnaðin og tryggleikan í gerandisdegnum hjá eldru borgarunum í kommununi, hevur Tórshavnar kommuna samtykt at seta heimavitjanartænastu á stovn.

**Endamálið við tænastuni er m.a:**
- at vitja regluliga í heiminum hjá teimum gomlu
- at práta um gerandisdagin
- at veita heilsuvegleiðing um trivna og menning
- at kunna um mongu og fjølbroyttu tilboðini og tiltøkini í kommununi
- at fáa tey gomlu at vera virkin í frítíðini
- at gerandisdagurin kann fáa størri lívsinnihald

Starvið umfatar eisini at samskipa visitatiónina til ellisheims-, røktarheims- og sambýlisplássini í kommununi.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at virka í tættum samstarvi við kommunulæknarnar og heimarøktina.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarin:
- er útbúgvin sjúkrasystir ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur royndir frá arbeiði við gomlum fólki
- er fyrikomandi og álitisvekjandi
- hevur umsitingarligar royndir

**Starvs- og setanarviðurskifti**
eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður skipað undir trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2002.

SNARSKIVAN

---

# Frá Happadráttinum

**Seinasti søludagur til 3. drátt er hósdagin 21. mars.**



Størstu vinningar hesaferð:

| | |
|---|---|
| 1x | 250.000 kr. |
| 1x | 75.000 kr. |
| 1x | 60.000 kr. |
| 1x | 30.000 kr. |
| 2x | 25.000 kr. |
| 3x | 15.000 kr. |
| 7x | 10.000 kr. |
| 15x | 5.000 kr. |

Ágóðin av Happadráttinum: 1/3 fer til ÍSF og 2/3 fara í grunn, ætlað brekaðum

**Eykavinningur 15.000 kr.**

Hin Føroyski Happadrátturin

---

# Tekniskur asistentur/ maskinteknikari



Søkt verður eftir einum fólki at byrja skjótast gjørligt

**Umsøkjarin skal**
- hava førleika í AutoCad
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- duga enskt
- vera álítandi

**Setanartreytir**
Løn sambært avtalu og eftir førleika.

Umsøknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda til Tera Postboks 49 FO-600 Saltangará. Merki brævbjálvan "teknistovan"

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja á tlf 448888 og spyrja eftir Arna ella Hans Jákup.

TERA

**Boks 49 - 600 Saltangará - tlf 448888**
**info@tera.as**

---

# Kunngerð

Mánadagin 11. mars og týsdagin 12. mars er ongin avgreiðsla.

**Stuðulsstovnurin**
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3272
FO–110 Tórshavn
Tlf. 319680 og fax 319682
t-postur: studul@studul.fo

---

# Frá Róðrarsambandi Føroya

RSF 1980

Ársaðalfundurin, sum lýstur var at verða leygardagin 9. mars kl. 10.00, er avlýstur.

Nýggjur ársaðalfundur verður í ÍSF-húsinum leygardagin 20. apríl kl. 10.00.

**Róðrarsambandið**

---



# Útbjóðing

Vegna Hvalvíkar Kommunu verður biðið um tilboð uppá viðkan av Kirkjugarðinum í Hvalvík.

Arbeiðið snýr seg í stuttum um gerð av:

- umleið 900m³ av sandi at veita
- umleið 2.200 m³ at blanda (mold – sand)
- umleið 850 m² at sáa við græsfræ
- umleið 75 m ø 160 m/m leiðingar
- umleið 175 m ø 110 m/m drenleiðingar
- umleið 6 stk. gjøgnumløbsbrunnar

Arbeiðið skal gerast í ár 2002.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Hvalvíkar Kommunu, móti at flyta kr. 500,– á konto í Føroya Banka nr. 6460–156.072.9

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur "Viðkan av kirkjugarði" skulu latast til Kommunuskrivstovuna í Hvalvík.

Licitatiónin verður mikudagin 3. apríl 2002 kl. 10.00 á kommunuskrivstovuni í Hvalvík, boðini verða tá latin upp, og tey sum hava boðið, hava rætt til at vera hjástødd.

**Hvalvíkar kommuna**

---

# Bilur til sølu



Ein Nissan Patrol árg. 96, koyrt 162.000 km.

Prísuppskot: kr. 150.000,–

Kann síggjast uppi hjá Super Dekk

**Ring tlf. 227989**

---

Valið er títt!

**Tú mást ikki sláa íhel!**
-verj tað ófødda barnið!

Vel eitt valevni, ið velur lívið!

www.provita.fo

---

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Deildarleiðari til Almanna- og heilsumálastýrið

**Eitt starv sum deildarleiðari fyri Fyrisitingarligu eindina í Almanna- og heilsumálastýrinum, verður við hesum lýst leyst til setan 1. apríl 2002 eftir nærri avtalu.**

**Talan er um leiðarastarv fyri stápseind við beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.**

**Høvuðsuppgávur:**

Deildarleiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av:
- Roknskaparhaldið í AHS, herundir sjálvt stýrið og tey stovnsnummur sum hoyra beinleiðis undir stýrið
- Móttøkuni/vekslaranum, sum hevur um hendi: telefon og viðskiftamóttøku, klokkuskipan, lyklar, innkeyp, fundarhøli.
- Reingerð
- Journal/Post
- Bóka- og lógarsavninum í AHS
- Viðlíkahaldinum av AHS
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur og aðrar leiðsluuppgávur fyri AHS.

**Løn og setanartreytir:**

Setanarøki er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Lønar- og setanartreytir verða samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið

Starvið er flokkað í lønarflokki IV.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 30 40 50.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**

- Skrivstovuútbúgving, vitan um almenna fyrisiting
- Ávísar leiðsluroyndir
- Kunnleika til Almanna- og heilsuøki
- Kunnleika til journalisering og Doculive journalskipan
- Kunnleika til EDV
- Kunnleika til roknskaparhald.

**Umsóknir:**

Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FR-110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 14. mars 2002 kl. 12.00.

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Fólk til asfaltarbeiði

Søkt verður eftir fólki til asfaltarbeiði at byrja fyrst í apríl 2002.

Áhugaði skulu seta seg í samband við Sjúrð Engskær á telefon 315160.

SNARSKIVAN

---

# Avlýsing

Vegna veður er neytalortakappingin, sum skuldi verða leygardagin 9. mars, útsett til leygardagin 23. mars.

**9. A á Venjingarskúlanum**

---

# MS - Miðnámsskúlin í Suðuroy

**"Framtíðin kemur ikki av sær sjávum"**

Vel MS. Nem alskyns vitan og gev tær sjávum møguleika til framtíðina.

MS - skúlin er í nærumhvørvinum við hugflogi og góðum samanhaldi.

**Umsóknarfreistin er 15. mars.**

Einstakar lærugreinir.
Ert tú tilkomin? Hevur tú hug og stundir til at víðka sjónarringin?
Miðnámsskúlin bjóðar tær møguleika at lesa lærugreinir sum stakgreinalestur, eisini fram til fult studentsprógv.
Laga lesturin til tín egna tørv og møguleika.

**Umsóknarbløð fáast við at venda sær til MS**
**Tlf 373622 ella 374011 WWW.midnam.fo**